## Viðgerðarstovnar hægri játtan

Meirlutin í fíggjarnevndini gongur ynskinum hjá landsstýrismanninum, Hans Paula Strøm, á møti um at hækka játtanina til viðgerðarstovnarnar Heilbrigdið og Blákrossheimið. Í upprunaliga fíggjarlógaruppskotinum fingu allar døgnstovnar innan sjúkrahúsverkið og almannaøkið lønarframskriving.

Tá viðgerðarstovnar eisini verða bólkaðir sum døgnstovnar ynskti landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, at játtanin til Heilbrigdið og Blákrossheimið varð hækkað.

Sambært fíggjarnevndarálitinum fáa Heilbrigdið og Blákrossheimið ávikavist 106.000 og 103.000 krónur meir í rakstrarjáttan, enn uppruna fíggjarlógaruppskotinum.

**.páll**

## Serviðgerðin flytir heim

Eitt av økjunum, sum stórur rumbul hevur verið um seinastu árini, hevur verið játtanin til serviðgerðir uttanlands. Tað er javnan komið fyri, at landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur verið noyddur at biðið um eykajáttan til serviðgerðir uttanlands, tí ov lítið av peningi hevur verið sett av á fíggjarlógini. Nú er kortini vent í holuni.

Í sínum tilmælum til løgtingsins fíggjarnevnd væntar trivnaðarnevndin, at nýbygningurin hjá Landssjúkrahúsinum fer at hava við sær, at viðgerðirnar uttanlands kunnu flytast heim til Føroya.

Hetta hevur fíggjarnevndin tikið til eftirtektar, og hevur lækkað játtanina til serviðgerðir uttanlands við 3,9 mió. krónum

**.páll**

## Mjólkastuðulin hækkaður

Eftir viðmerking frá vinnunevndini hevur meirlutin í fíggjarnevndini gjørt av at hækka mjólkastuðulin við 1. mió. krónum. Mjólkastuðulin verður tískil 1. kr. pr. litur.

Meðan mjólkin fær størri játtan, ætlar fíggjarnevndin at lække stuðulin til neytakjøt, stráfóður og velting við í alt 340.000 krónum. Sostatt er talan um eina samlaða hækking í játtanin til landbúnaðarstuðul á 660.000.

**.páll**

# Landsstýrismenn skulu virða játtanina

**– Landsstýrismenn skulu læra seg at virða ta játtan, teir fáa á fíggjarlógini. Tað gongur snøgt sagt ikki, at teir koma seinast í árinum og biðja um eykajáttan. Teir skulu halda seg til teir karmar, sum løgtingið hevur samtykt, sigur formaðurin í fíggjarnevndini, Anfinn Kallsberg**

ÁLIT FRÁ FÍGGJARNEVNDINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í dag verður farið undir aðru viðgerð av fíggjarlógini fyri 2005. Fíggjarnevndin kom mánadagin við sínum tilmælum, og meirlutin í nevndini hevur gjørt av skarva 13 mió. krónur av fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Í uppruna uppskotinum hjá Bárði Nielsen var hallið 197 mió. krónur, men nýggjar inntøkumetingar frá fíggjarmálaráðnum fyri 2005 hava havt við sær, at hallið á fíggjarlógini 2005 var mett at vera 241 mió. krónur. Í álitinum frá fíggjarnevndini hevur meirlutin skarva av hallinum, so at botnlinjan nú eitur 228 mió. krónur.

– Hetta verður nøkunlunda tað. Eg vænti ikki, at nógvar broytingar vera gjørdar afturat, áðrenn endaliga uppskotið verður samtykt, tí flestu broytingar eru gjørdar í samráð við landsstýrismenninar, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini.

### Eingin meirjáttan

Undir fíggjarlógarviðgerðum seinastu árini hevur fíggjarnevndin strongt á at fáa landsstýrismenninar at virða ta játtan, teir fáa við ársbyrjan. Hóast greið boð frá fíggjarnevndini, hava landsstýrismenn seinastu árini kortini havt ilt við at tikið boðini í álvara, men hesum trupulleika vil Anfinn Kallsberg koma til lívs.

– Landsstýrismenn skulu læra seg at virða ta játtan, teir fáa á fíggjarlógini. Tað gongur snøgt sagt ikki, at teir koma seinast í árinum og biðja um eykajáttan fyri pengar, sum eru brúktir í teirra játtan, tí tað er ikki rætti at máti at stýra upp á. Teir skulu halda seg til teir karmar, sum løgtingið hevur samtykt, sigur formaðurin í fíggjarnevndini avgjørdur.



*– Vit vilja broyta siðvenjuna. Tað skal vera eitt undantak, og ómetaligar góðar grundgevingar um vit skulu góðtaka at lata eykajáttan, sigur Anfinn Kallsberg*
*Mynd: Savnsmynd*

Anfinn Kallsberg vísir á, at í framtíðini skal tað verða undantakið um ein eykajáttan verður góðtikin av fíggjarnevndini.

– Vit vilja broyta siðvenjuna. Tað skal vera eitt undantak, og ómetaligar góðar grundgevingar um vit skulu góðtaka at lata eykajáttan, sigur Anfinn Kallsberg

### Tætt samstarv

Undir fíggjarlógarviðgerðini fyri 2004 í vár tók ein orrusta seg upp millum landsstýrið og fíggjarnevndina, tá landsstýrið varð biðið um skarva 30 mió. krónur av fíggjarlógini

Undir fíggjarlógarviðgerðini hesaferð tykist arbeiðslagið millum meirlutan í fíggjarnevndini og landsstýrið vera betri.

– Tað hevur verið eitt heilt annað útgangsstøðið hesaferð. Sammett við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2004, hava vit hesaferð verið við til at fyrireika fíggjarlógaruppskotið, sum kom frá landsstýrinum. Umboð fyri landsstýrið, flokkarnar og samgongulimir í fíggjarnevndini hava verið við til orða fíggjarlógaruppskotið fyri 2005, og hetta hevur havt við sær, at vit í fíggjarnevndini hava minnið at finnast at hesaferð, sigur Anfinn Kallsberg.

**FÍGGJARLÓGIN 2005**

**Upprunauppskotið:** - 197 mió.

**Nýggj inntøkumeting 2005:** 44 mió. minni í inntøkum

**Upprunauppskot og nýggj inntøkmeting:** -241 mió. krónur

**Fíggjarnevndarálitið:** -228 mió. krónur

Minnilutin:

# Skattalættin er ábyrgdarleysur

**– Skattalættin hjá samgonguni virkar ikki ekspansivt upp á krónurenslið í føroyska samfelagnum. Hann virkar fíggjardepressivt, tí at so fáa ágóðan av honum, og serliga tí, at hann hjá fólki flest kennist ábyrgdarleysur, nú tá samgongan frammanundan hevur reyð tøl á botnlinjuni, sigur minnilutin í fíggjarnevndini í sínum viðmerkingum til fíggjarlógaruppskotið hjá samgonguni**

ÁLITIÐ FRÁ FÍGGJARNEVNDINI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Við hesum fíggjarlógaruppskoti skuldi rekast ein ekspansivur fíggjar- og búskaparpolitikkur. Onkursvegna virka orðini sum ein umbering fyri ein skattalætta, sum eingin hevur biðið um og tíðanskeldur spurt eftir, og sum bara gagnar vælbjargaðum føroyingum.

Í viðmerkingunum til uppskotið hjá meirlutanum í fíggjarnevndini finst minnilutin, Karsten Hansen, Páll á Reynatúgvu og Kári P. Højgaard, hvassliga at ætlaða skattalættanum hjá samgonguni.

Minnilutin heldur, at tað snøgt sagt ikki hongur saman at hava eitt stórt hall á fíggjarlógini, og síðani at vaksa um hallið við at minka um inntøkurnar hjá landskassanum við einum skattalætta.

Við einum ætlaðum halli hjá samgonguni á fíggjarlógini í 2004 og 2005 á í alt 450-500 mió. krónur, heldur minnilutin ikki tað er ábyrgdarfult at lække skattin við 60 mió. krónum í 2005. Minnilutin vísir eisini á, at skattalættin hjá samgonguni ikki fer at seta ferð á búskapin, men hinvegin at seta ferðina niður.

– Skattalættin hjá samgonguni virkar ikki ekspansivt upp á krónurenslið í føroyska samfelagnum. Hann virkar fíggjardepressivt, tí at so fáa ágóðan av honum, og serliga tí, at hann hjá fólki flest kennist ábyrgdarleysur, nú tá samgongan frammanundan hevur reyð tøl á botnlinjuni upp á fjóðringsmilliard áðrenn avdráttir, stendur skrivað í viðmerkingunum.

### Skattahækking

Í viðmerkingunum til álitið hjá fíggjarnevndini rør minnilutin eisini fram undir, at nú tað er komið undan kavi, at fleiri kommunur nýta høvið til at hækka skattaprosentið, verður úrslitið hjá av ætlaða skattalættanum hjá samgonguni ein reell skattahækking hjá verkafólki.

– Tær hægru inntøkurnar verða loftaðar av 50 prosents markinum, meðan láginntøkurnar gjalda fyri lækkingina hjá háinntøkunum. Áleið 13.000 lønmóttakarar kenna at kalla ongan ágóða av uppskotinum. Málið er sambært viðmerkingunum, at lønin ikki verður etin upp av harðari skatting, Tá ið so samgongan tekur allan peningin inn aftur við avgjøldum, er tað í andsøgn við endamálið við uppskotinum, heldur minnilutin í fíggjarnevndini.

**TILMÆLINI FRÁ MINNILUTANUM**

1) At strika skattalættan tey komandi fýra árini
2) Í samráð við arbeiðsmarknaðin at umskipa barsilsskipanina til eina arbeiðsmarknaðarskipan burturav
3) At einskilja hesar av almennu fyritøkunum: Føroya Banka, Føroya Tele, Føroya Fiskavirking, Atlantsflog, Realin, Húsalánsgrunnin, og at nýta søluvirðið til at niðurgjalda almennu skuldina, við møguleika fyri at lække heildarveitingina.
4) At fáa landsstýrisfólkini at halda lógarásettu fíggjarheimildirnar, bæði tá tá ið um rakstur og lógarbundna játtan ræður
5) At umskipa framtaksgrunnin til ein váðafúsan grunn, hvørs endamál skal vera at menna gransking og nýskapandi vinnuhugsan